Norðurlendska ráðharraráðið er vertur

# EITT BARBERSHOP TILTAK: MENN OG DREINGIR FYRI JAVNRÆTTINDUM MILLUM KYNINI

og ein útnorðurráðstevna

# KYNLIG JAVNRÆTTINDI VIÐ HÚS OG Á ARBEIÐSPLÁSSINUM

*Vanliga hava konufólk verið á odda í arbeiðinum fyri kynligum javnrættindum, og menn hava fyri tað mesta ikki verið við í kjakinum. Tiltakið "Barbershop" eggjar monnum og dreingjum at vera við í arbeiðinum at fáa í lag javnvág millum kynini við betur at skilja, hvussu kynjavnvág ger einstaklingar eins og samfeløg før fyri at fáa fult gagn av teirri búskaparligu og sosialu kraftini, ið liggur í. Meira kunning og skráseting á heimasíðuni hjá ráðstevnuni:*

***www.barbershopconference.fo***

## SET HESAR DAGAR AV

### 11. & 12. JUNI 2019, Tórshavn

Tiltakið "Barbershop"og ráðstevnan um kynlig javnrættindi við hús og á arbeiðsplássinum verða skipað undir vernd av íslendska formansskapinum í Norðurlendska ráðharraráðnum sum samstarv millum íslendska Forsætismálaráðið og Almannamálaráðið í Føroyum. Fremsta málið er at skapa ein pall fyri áhugapartar at virka beinleiðis í arbeiði fyri javnrættindum hjá Norðurlendska ráðharraráðnum og at skifta orð um nýggj framtøk og um javnstøðu millum kynini í Føroyum og Íslandi. Í báðum tiltøkum verður dentur lagdur á, hvussu menn kunnu gera sítt til at bøta um kynjavnvágina á arbeiðsplássum eins og við hús.

Tiltøkini eru grundað á átakið hjá norðurlendsku forsætisráðharrunum "The Nordic Gender Effect at Work", sum er í fýra táttum, ið sýna, hvussu stóran týdning tað hevur at gera íløgur í alment undirstøðukervi fyri at fremja javnrættindi millum kynini. Ein táttur er at skipa barnsburðarfarloyvi við løn, bæði til mammu og pápa, atgongd til barnaansing fyri rímiligan penga um allan heim, at arbeiðstíðir verða smidligari, og at eins stórar íløgur verða gjørdar í menniskjaliga tilfeingið í mannligum og kvinnuligum starvsfólki fyri at stimbra javnrættindi millum kynini í allari leiðslu. Hetta, sum alt elvir til búskaparligar og sosialar fyrimunir. Í Norðurlondum eru vit komin langt bæði alment og privat at viðgera mismun millum kynini og at bjóða bæði monnum og kvinnum eina javnvág millum arbeiði og frítíð. Kortini er nógv, ið framvegis krevur ábøtur, og samfelagið alt, sum tað er, má vera við í tí arbeiðinum.

Ráðstevnan fer at varpa ljós á væl eydnaðan almennan politikk, góðar gongdir í privata geiranum, akademiskt innlit í ágóðarnar av kynligari javnvág bæði við hús og á arbeiðsplássinum og teir ótilvitaðu sosialu normarnar, sum framvegis darva framgongdina.

**MEIRA KUNNING UM BARBERSHOP-KONSEPTIÐ OG BARBERSHOP-AMBOÐSKASSA UM HEFORSHE (HANNFYRIHANA) HEIMASÍÐUNA:**

*www.heforshe.org/barbershop*

Barbershop
EST 2015

**Skrá fyri ráðstevnuna er á síðu 2**

# SKRÁ

*GG! Skráin er fyribils og broytingar kunnu koma fyri / Endalig skrá verður send undan ráðstevnuni*

TÝSDAG 11. JUNI 2019

## EITT BARBERSHOP TILTAK: MENN OG DREINGIR FYRI JAVNRÆTTINDUM MILLUM KYNINI

**ÖSTRÖM, SKÁLATRØÐ 18, 100 TÓRSHAVN**

*Vertir eru Forsætismálaráðið (Ísland), Almannamálaráðið (Føroyar) og Løgmansskrivstovan (Føroyar).*

**13.00 – 14.30**

**KYNLIG JAVNRÆTTINDI KOMA ØLLUM VIÐ**

*Serfrøðingar og umboð fyri vinnulívið skifta orð um, hví vit skulu arbeiða fyri kynligum javnrættindum, og hvørjar forðingar mugu beinast av vegnum*

**KAFFISTEÐGUR**

**14.45 – 16.45**

**SAMVIRKIN KJAKSMIÐJA – BARBERSHOP: LEIÐSLUHUGSANIR UM KYNLIG JAVNRÆTTINDI**

*Luttakarar kanna sosialar normar, kynbundnar fyrimyndir og sínar egnu ótilvitaðu kynfordómar*

**16.45 - 17.30**

**ÁTØK Á EGNUM ARBEIÐSPLÁSSI HVUSSU KANN EG GERA MUN?**

*Luttakarum stendur í boði at virka fyri ávísum átaki á sínum egna arbeiðsplássi og í vina- og kenningaskara og at melda seg til HeForShe*

**17.30**

**KOKKTEYL MÓTTØKA**

MIKUDAG 12. JUNI 2019

## ÚTNORÐURRÁÐSTEVNA KYNLIG JAVNRÆTTINDI VIÐ HÚS OG Á ARBEIÐSPLÁSSINUM

**SMÆRAN, J.H. SCHRØTERGØTA 7, 100 TÓRSHAVN**

*Vertir eru Forsætismálaráðið (Ísland), Almannamálaráðið (Føroyar) og føroyska Javnstøðunevndin.*

**8.30 - 9.00**

**RÁÐSTEVNAN VERÐUR SETT**

**9.00 - 9.45**

**FORELDRAFARLOYVI – ÍSLENDSKA SKIPANIN**

*Somu rættindi til foreldrafarloyvi við løn – íslendska fyridømið, og kjak millum politikarar, serfrøðingar og umboð fyri arbeiðsgevarar*

**9.45- 10.30**

**VÁTTAN UM SOMU LØN**

*Royndirnar í Íslandi og kjak við serfrøðingum og politikarum úr Føroyum og Íslandi*

**KAFFISTEÐGUR**

**10.45 – 11.30**

**PARTTÍÐARARBEIÐI – FRAMLØGA AV KANNING, GJØRD Í FØROYUM**

*Politikarar, serfrøðingar, umboð fyri arbeiðsgevarar og fakfeløg skifta orð um búskaparligu útlitini, og hvussu hetta rák kann verða broytt*

**11.30 – 12.15**

**KYNBÝTTUR ARBEIÐSMARKNAÐUR – HVUSSU FÁA VIT EIN FJØLBROYTTARI ARBEIÐSMARKNAÐ?**

*Útbúgvingarstovnar, tingfólk og fakfeløg kjakast um evnið*

*Ein myndabásur verður standandi allan dagin, har luttakarar kunnu greiða frá sínum lyftum á sosialum miðlum*

# Hví eitur tað Barbershop?

**Flestu menn hava verið og klipt sær. Á hárskerastovum – ella í skiftirúmum – sita menn og práta saman og skifta orð um atburð og hugburð til viðurskifti millum kynini – eisini hvat tað merkir at vera maður. Viðurskifti millum mann og kvinnu verða mangan diskuteraði, og ov ofta avdúkar prátið fastlæstar kynleiklutir hjá monnum og kvinnum. Sjáldan viðgera menn í álvara rótina til mismunin millum kynini.**

**Barbershop er góður pallur til prát millum menn um egnan atburð, framíhjárættindi og teirra lut at styrkja megi og mátt kvinnunar. Á henda hátt ger Barbershop sítt til at eggja monnum til at fara undir arbeiðið, ið krevst fyri at fáa javnrættindi millum kynini, at eggja øðrum monnum at gera tað sama, og at fáa prátið um javnrættindi inn í allar hárskerastovur og øll skiftirúm um allan heim.**

**Saman fáa vit javnstøðu millum kynini.**

*@BarbershopConf*
*#BarbershopToolbox*
*#NordicSolutions*
*#HeForShe*